# ítróttur

Nr. 1 • hósdagur • 3. januar 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

## Hjalmar skal hjálpa Lars

**Hjalmar Klein Olsen úr Vestmanna er nú settur sum hjálpar-venjari hjá mans-landsliðnum í hond-bólti**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Venjarin hjá mansliðnum í hondbólti, Lars Nedergaard, hevur nú havt fyrstu venjingarnar við bruttohópi sínum. Umframt at venjarin hevur nýtt hesa tíðina til at kunna seg um leikarahópin, so hevur HSF eisini nýtt tíðina til at finna ein hjálparvenjara til landsliðið.

Talan er um 34 ára gamla Hjalmar Klein Olsen, sum áður hevur vant VÍF, og sum annars í drúgt áramál hevur verið aktivur á føroyskum hondbólti.

### Fáar landsdystir

Umframt royndir sínar úr føroyskum hondbólti, so hevur Hjalmar eisini eitt skifti verið aktivur í Danmark, har hann í tvey ár leikti við Ajax, sum tá spældi í næst bestu donsku deildini.

Í landsliðshøpi hevur hann ikki tær stóru royndirnar, men hetta kemst av, at hann var partur av ættarliðnum, sum mest sum datt niður fyri í føroyskum landsliðshøpi. Nakrar landsliðsvenjingar og einir tveir landsdystir hava tó verið á skránni.

Sjálvur sigur Hjalmar, at tað er nakað síðani, at HSF heitti á seg um at gerast hjálparvenjari hjá hondbóltslandsliðnum, og at hann mest sum alt fyri eitt tók av hesum, men at samstarvið ikki varð formaliserað, fyrr enn Lars Nedergaard nú aftur var í Føroyum.

Hjalmar gavst annars sum venjari hjá VÍF, tí hetta kravdi ov nógva tíð, men hann er ikki bangin um, at hetta eisini fer at verða galdandi í nýggja starvinum.

– Fyrst og fremst er talan ikki um, at eg dag og dagliga skal fáast við venjingina. Talan er um at fylgja við hondbóltinum her heima, og so sjálvandi eisini arbeiðið í sambandi við tær venjingarnar, sum eru. Tær verða heldur ikki so nógvar fyrstu tíðina, so krøvini í so máta verða als ikki tey somu, sigur Hjalmar Klein Olsen at enda um nýggja venjarasessin.



*Tað verður 34 ára gamli Hjalmar Klein Olsen, sum skal verða hjálparvenjari hjá manslandsliðnum í hondbólti*

Mynd: Jens Kr. Vang

## Favorittarnir hittast ikki

**Tey bæði sterkastu mansliðini, Neistin og VÍF, sluppu undan at hittast í hálvfinal-unum**

COCA-COLA KAPPINGIN
*Jákup Mørk*

Í landskappingini eru VÍF og Neistin mest sum einastu boðini upp á ein komandi føroyameistara, og tó at alt kann henda í steypakappingini, so eru tey bæði oddaliðini eisini favorittar til finaluplássini í hesari.

Lutakastið fríggjadagin lagaði seg soleiðis, at vestmenningar fara at takast ímóti strandingum í sínari hálvfinalu, meðan Neistin og H71 fara at spæla tvær grannauppgerðir um seinna finaluplássið.

### Skal verða støðugt

Tað er einki at siga til, at tey bæði oddaliðini eru favorittar at vinna sínar dystir, men hinvegin eigur møguleikin hjá H71 og StÍF als ikki at avskrivast. Her er talan um trið- og fjórðfremsta liðið á stigatalvuni, og finna tey rætta spælið fram til hálvfinalurnar, skulu hvørki Neistin ella VÍF kenna seg trygg í finaluplássinum.

Størsti veikleikin hjá StÍF og H71 hevur tó í ár verið óstøðug avrik, og í so máta er tað helst ein meinbogi, at hálvfinalurnar fevna um tveir dystir, tí tað er ikki nóg mikið við einum góðum avrikið í øðrum av dystinum. Skulu Neisitn og VÍF koppast yvir tveir dystir, er neyðugt, at avrikið er í hæddini báðar ferðirnar, og so er spurningurin, um kappingarneytarnir til bronsuplássið megna hetta.

## Lutakastið

**Lutakastið til hálvfinalurnar í Coca-Cola kappingini varð fríggjadagin kl. 14.00. Niðanfyri prenta vit yvirlitið yvir, hvussu dystirnir í kappingini verða leiktir**

**Kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 12.01 | 17.00 | Stjørnan-VB |
| 16.01 | 18.30 | Neistin-VÍF |
| 19.01 | 17.00 | VB-Stjørnan |
| 23.01 | 18.30 | VÍF-Neistin |

**Menn**

| | | |
|---|---|---|
| 16.01 | 20.00 | H71-Neistin |
| 16.01 | 20.00 | StÍF-VÍF |
| 23.01 | 20.00 | VÍF-StÍF |
| 23.01 | 20.00 | Neistin-H71 |



*Høgni Hansen og Jógvan Martin Mørk drógu brævbjálvarnar við nøvnunum á luttakarunum í hálvfinaluni*

Mynd: Jens Kr. Vang

## Endurtøka hjá kvinnunum

**Hálvfinalurnar í Coca-Cola kappingini hjá kvinnum verða endurtøkur av finalunum frá í fjør**

COCA-COLA KAPPINGIN
*Jákup Mørk*

Fríggjadagin millum jól og nýggjár varð drigið um, hvørjir dystirnir í hálvfinaluni í Coca-Cola kappingini skulu verða.

Hjá kvinnunum vóru liðini í pottinum júst tey somu, sum tey vóru í fjør, og tá avtornaði, vórðu dystirnir í hálvfinalunum eisini teir somu.

### Hat-trick til VB

Tað merkir, at VÍF skal spæla móti Neistanum, meðan VB og Stjørnan fara at dystast um hin finalusessin.

Einki er at ivast í, at hjá Neistanum var talan um ringast hugsandi lutakastið. VÍF hevur nú í hálvt annað ár verið í serflokki í kvinnukappingini, og yvir tveir dystir er mest sum óhugsandi, at nakar skal kunna koppa teimum.

Hin hálvfinalan sær hinvegin sera spennandi út. VB hevur nú triðja árið á rað møguleika at spæla seg í steypafinaluna, og okkurt bendir á, at hetta fer ikki at verða heilt ógjørligt hjá teimum. Stjørnan hevur verið í einum aldudali seinastu tíðina, og í dystinum millum liðini stutt fyri jól, eydnaðist VB at vinna.

Hin vegin hevur gongdin hjá VB ikki verið hin besta seinastu vikurnar, og hava tær millum annað tapt greitt fyri bæði Neistanum og Kyndli, so tað tykist heilt greitt, at vinnarin av hálvfinaluni verður tað av liðunum, sum fyrst megnar at vinna seg úr verandi aldudalinum.



# Kaldur bussførari

**Hóast Rói Ljósheim var vitandi um, at eldur var í bussinum meðan hann var inni í Leynatunnlinum, helt hann leiðina fram og koyrdi bussin trygt útum Kollfjarðar-megin**



*Orsøkin til eldin umborð á bussinum skal nú finnast*

Mynd: Jens Kristian Vang

BUSSURIN
*Turið Kjølbro*

– Eg var ongantíð bangin. Vildi bara sleppa heim. Einasta, ið var eitt sindur ótespiligt, var nógvi roykurin, sum kom frá bussinum. Bussførarin var róligur og hevði yvirlit á støðuni alla tíðina. Bilar, sum komu til, vórðu steðgaðir og spurdir, um teir høvdu sløkkiútgerð, men tá ið teir ikki høvdu tað, var einki at gera. Ikki fyrr enn førarin sá, at ikki bar til at sløkkja eldin, bað hann okkum koma út og taka alt við okkum, sigur Randi Kúrberg í Havn, sum var millum ferðafólkini í stóra liðbussinum hjá Bygdaleiðum, ið eldur kom í nýggjársaftan.

Tey fimm ferðafólkini í bussinum komu øll heim í hýruvogni, sum Strandferðslan útvegaði teimum.

– Aftaná havi eg sjálvtsagt gjørt mær tankar um tað sum hendi, men komi bara til tað, at bussførarin hevur verið óførur. Sum ferðafólk fingu vit ongantíð varuga av, at eldur var í bussinum meðan vit vóru í tunnlinum. Heldur ikki gáaðu vit eftir, at hann setti ferðina upp inni í tunnlinum. Útkomin steðgaði hann bussinum so mikið langt frá tunnlinum, at ferðslan kundi halda fram ótarnað. Ein ógvuliga professiónellur førari, sum avgjørt hevur uppiborið eitt herðaklapp, sigur Randi Kúrberg.

### Trygdin í hásæti

Ferðafólkaflutningsleiðarin á Strandferðsluni, Poul Jákup Thomsen, er ikki í iva um, at Rói Ljósheim, sum koyrdi bussin, tók allar tær røttu avgerðirnar nýggjársaftan, tá ið hann gjørdist greiður yvir, at eldur var í bussinum.

– Bussførarin taklaði støðuna fyrimyndarliga, var róligur, gav øðrum uppgávur so sum at ringja eftir hjálp, og ráðfesti uppgávurnar rætt.

Sum skilst er eldur komin í bussin, eftir at hann er komin inn í Leynatunnilin, tí førarin í bilinum, sum var í hølunum á bussinum sá ikki eld fyrr enn komið var inn í tunnilin. Eftir at førarin gjørdist greiður yvir eldin, skundaði hann sær at fáa bussin út úr tunnlinum, royndi at sløkkja eldin og tá ið tað ikki eydnaðist, fekk hann fólk, viðføri og aðrar lutir úr bussinum, meðan ringt varð eftir hjálp.

– Eitt slíkt óhapp setur avgjørt nakrar tankar í gongd, og vit fara at kanna eftir sera gjølla, hvussu sløkkiútgerðin skal og eigur at vera í bussum. Bussførarar hjá Bygdaleiðum verða útbúnir at klára støður sum hesar og hesin hevur brúkt ta vitanina til fulnar. Hvussu sløkkiútgerðin skal vera í tunnlunum, fari eg at lata serkøn á økinum at úttala seg um. Trygdin hjá ferðafólki stendur ovast á listanum yvir raðfestingar hjá stovninum, og tað er framvegis trygt at ferðast hóast eitt óhapp sum hetta. Spurningurin er, um vit kunnu tryggja okkum upp aftur betur enn vit gera í dag, eitt nú við atliti til tunnlarnar og til tað, at vit fáa fleiri undirsjóvartunnlar, sigur Poul Jákup Thomsen.

Krøvini til trygdina umborð á bussunum verða ikki slakað, nú fleiri leiðir fara á privatar hendur.

– Í sambandi við útbjóðingina hava vit hert trygdarkrøvini og vit hava framvegis eftirlit við, at trygdin er í hásæti. Vit seta stór krøv til bæði førara og buss eitt nú viðvíkjandi koyriteknikki, sløkking, fyrstu hjálp, og sálarligari fyrstu hjálp. Um útbúgvingin hjá førarunum skal gerast enn betri, fara vit at taka støðu til nú.

Seinnapartin í gjár skipaði Strandferðslan fyri lítlari samkomu á stovninum, har bussførarin varð heiðraður fyri avrikið. Vegna kanningar í málinum, bar ikki til at fáa viðmerkingar frá bussføraranum, áðrenn blaðið fór til prentingar.



*Sum skilst er eldur komin í bussin, eftir at hann er komin inn í Leynatunnilin.*

Mynd: Jens Kristian Vang



*Roykurin av eldinum kundi lukast nógvar hundrað metrar burtur.*

Mynd: Jóhan K. Mouritsen